# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*– Tíðin er komin, til at vit taka sannleikan um veðurlagið í álvara heldur enn at skúgva hann undan okkum*
*(Barrack Obama)*

# Minst 20 bumbumenn ganga leysir

**Teir tíggju menninir, sum framdu atsóknirnar í Mumbai, vóru úr einum stórum bólki av sjálvmorðsbumbumonnum. Eingin veit, hvar hinir eru**



*Zaki-ur-Rehman Lakhvi, sum sambært indisku myndugleikunum legði atsóknirnar at Mumbai til rættis (Mynd: AP)*

– 20 aðrir vóru til reiðar at lata lív, og tað er skelkandi, at teir ganga leysir, sigur varaløgreglustjórin í Mumbai, Deven Bharti, við The New York Times. Hann sigur seg hava fingið upplýsingar um, at tann pakistanski felagsskapurin Lashkar-e-Taiba hevði valt 30 ungar menn til at fremja sjálvmorðsatsóknir. Teir, sum framdu atsóknirnar í Mumbai, ið kostaðu 171 mannalív, vóru úr hesum bólkinum, sigur hann.

Muhammad Ajmal Kasab, sum var tann einasti av álopsmonnunum í Mumbai, sum bleiv tikin á lívi, skal undir avhoyringum hava greitt indisku løgregluni frá, hvuaau teir 30 menninir fingu venjing í Pakistan.

Hann hevur eisini sagt, at hann og níggju aðrir ungir menn vórðu valdir til at fremja atsóknirnar í Mumbai. Teir seinastu tríggjar mánaðirnar undan atsóknini vóru teir fyri seg sjálvar. Síðani vórðu teir býttir sundur, soleiðis at tveir menn skuldu taka lut í hvørjum álopi.

Kasab hevur undir avhoyringunum sagt, at hann veit ikki, hvar hinir 20 menninir, sum vóru í venjingarleguni, eru nú Indisku myndugleikarnir halda ikki, at menninir eru komnir til India, men teir siga seg ikki vita tað við vissu.

### Oddamaður tikin

India hevur lagt stórt trýst á Pakistan fyri at fáa landið at gera meiri fyri at steðga virkseminum hjá teimum islamistisku bólkunum. Pakistanska stjórnin hevur svarað, at hon hevur tikið fleiri menn, sum eru undir illgruna fyri yvirgang.

Millum teir, sum sita í varðhaldi í Pakistan, er Zaki-ur-Rehman Lakhvi, sum sambært pakistonsku myndugleikunum er ein av oddamonnunum í Lashkar-e-Taiba, og sum sambært indisku løgregluni legði atsóknirnar at Mumbai til rættis. Í USA er hann eftirlýstur fyri yvirgang, og amerikanska fregnartænastan sigur seg hava upplýsingar um, at hann hevur verið við í yvirgangi í Kekenia, Bosnia, Irak og í Landssynningsasia.

India hevur biðið Pakistan útflýggja fleiri menn, sum hava tilknýti til Lashkar-e-Taiba, men tað vil pakistanska stjórnin ikki.

- Eru prógv ímóti monnunum, koma teir fyri rættin í Pakistan, sigur stjórnin í Islamabad.

## STUTT SAGT

### Sjáldsom jól



*Tveir samkyndir niðurlendingar í jólahýri*
*(Mynd: Reuters)*

Í Niðurlondum verður jólahaldið í ár ikki rættiliga, sum tað plagar. Tey samkyndu í býnum Amsterdam hava gjørt av broyta ymiskt við jólunum, soleiðis at tað samsvarar betur við teirra lívsstíl.

Millum annað er tað fallið niðurlendsku kirkjuleiðarunum fyri bróstið, at tey samkyndu ætla ikki at brúka ta vanligu myndina av Mariu og Jósef saman við tí nýføddu Jesusi,. Ístaðin fyri fara tey at hava eina mynd, har ein maður stendur undir liðini á Jósef og ein kvinna undir liðini á Mariu.

Fleiri trúarsamfeløg í Niðurlondum eru í øðini inn á ætlanina hjá teimum samkyndu í Amsterdam. Trúarsamfeløgini siga, at tey samkyndu niðra jólaboðskapin hjá teirri evangelisku kirkjuni, og tey hava biðið býráðspolitikararnar steðga tiltakinum. Tey samkyndu hava svarað, at tey ætla sær ikki at niðurgera jólaboðskapin. Tey siga, at jólaboðskapurin er ikki bara ein boðskapur um trúgv, men eisini um kærleikan og familjuna, og tað ætla tey at leggja dent á.

### Í fongsul fyri at smugla djór

Ein dómstólur í Suðurafrika hevur dømt ein mann eitt árs fongsul fyri at hava roynt at smugla sjáldsom djór av oynni Madagaskar til Suðurafrika. Maðurin, sum er 29 ára gamal, bleiv tikin á flogvøllinum í býnum Antananarivo í síðsta mánað við fleiri sjáldsomum djórum í viðføринum.

Djóralívið á Madagaskar er sera fjølbroytt, og har eru fleiri djórasløg, sum ikki finnast aðrastaðni, og tí er tað strangliga bannað at flyta djór haðani.

Løgreglan sigur, at hon fann meiri enn 100 smá djór í viðføринum hjá manninum. Teirra millum vóru ein kamelón og fleiri sjáldsamir froskar.

## Bretar úr Irak

**Bretska stjórnin er farin undir fyrireikingarnar til at taka teir seinastu umleið 4.000 bretsku hermenninar úr Irak.**

**BBC og fleiri bretsk bløð siga í dag, at ætlanin hjá stjórnini er at fara undir afturtøkuna í mars, og at teir seinastu hermenninir skulu fara úr Irak í juni næsta ár.**

**Teir 4.100 bretsku hermenninir, sum eru í Irak, hava støð við býin Basra har suðuri í landinum. Sambært keldum í verjumálaráðnum í London skulu amerikanskir hermenn yvirtaka eftirlitið við Basra, tá teir bretsku hermenninir fara haðani.**

**Fleiri bretaskir hernaðarfrøðingar vænta, at afturtøkan úr Irak fer at hava við sær, at Bretkand fer at økja sítt virksemi í Afghanistan ístaðin fyri.**

# Ferðafólk ræðast sjórænarar



*"Columbus" er á veg runt jørðina við ferðafólki (Mynd: Reuters)*

Fleiri hundrað ferðafólk eru á veg runt jørðina við ferðamannaskipinum "Columbus", men tey hava gjørt greitt, at tey vilja ikki vera umborð á skipinum allan vegin. Orsøkin er, at fólk eru bangin fyri teimum somalisku sjórænarunum og tora tí ikki at sigla ígjøgnum Adenvíkina. Týska felagið Hapag-Lloyd, sum skipar fyri ferðini runt jørðina, sigur, at ferðafólkini verða sett í land og síðani flutt við flogfari til Dubai, hagar skipið kemur eftir teimum. "Columbus" skal sigla ígjøgnum Adenvíkina, men tá verður bara manningin umborð, skrivar AP.